ALMANNASTOVAN GONGUR PARTAPOLITISK ØRINDIR!

Undir samgongusamráðingunum millum vór 4 flokkanna, ið nú skipa samgongu, kom skriv frá Almannastovuni, sent 09.09.1994, til 4 sera tinkningar bátt var við til at spenna bein fyri Verkamannafylkingini og møguleikunum hjá arbeiðsleysum at fáa bergt forsorgarveitingar.

Verkamannafylkingin arbeiddi undir samráðingunum við hinar flokkarnar um at fáa forsorgarlógina í sambandi við arbeiðsleys broytta soleiðis, at arbeiðsleys tørvsvøkt skuldu hava eina tørvsútrokning, eftir somu meginreglum sum fólk, ið fáa forsorgarhjálp vegna sjúku, barnsburð, samlívsslit og annað. Við øðrum orðum skuldi arbeiðsleys hava veitingg, ið var bert eftir tørvinum hjá tí einstaka, soleiðis at fólk eisini fingu veitingg til nevdugar fastar tilmeldingar, tí við á hámarki 12 mánaðum ikki skuldi fara upp um tað, eru í mesta lagi kann fáa 84 ALS, og eyvindur er fólk íkkert veitingg tryggjar fyri at fáa forsorgarhjálp.

Tann 10.10.1994 sendi undirtitlaði vegna Verkamannafylkingina brev til Almannastovuna og greiddi bonus frá, at vit vóru sera fleygd við leiðir Almannastovunnar undir samgongusamráðingunum. Avrit hesin eisini sent til landsstýrismannin í Almannamálum og Almanna og heilsuverndina í Tórgarði.

Eftir at hava biðið í meir enn 3 mð. eftir svari og eftir at hava ryki eftir svari, verður ikki biðið longur og tí kemur henda almennskriving fyri.

Samstiðis, tí Almannastovan sendi tí samgongusamráðingunum er sera subjektiv og kalevent í allar mátar, og tí verður upplýst, at tvívl fáanst um tað at í samgongusamráðingunum í øðrum orðum, so tvívl latna fingið Almannastovan hjálpt fyri tríðilsmál á ó-starvsi, ið setur eitt undirlátt upp á spæl við tilkum, av ávirkum politiskum umbindum skrivi.

Eitt sanligt krav til eina og hvørja umsitingg má vera, at umsitingin skal vera objektiv í sínum arbeiði, óavsett hvat politiskari yvirskipan av hinni. Eitt umsitingarstarvsmannaskrivstovuverk skal tí ikki kunna ríggja nakað upp fyrimunir vóru, ella vóru fráfallsfólk fáa betur fíggjarligar møguleikar at lívbjarga sær, vælt at tankja um stovnsins er fitna fyri, eisa vil viggja tess.

Almannastovan cigur eftir minum tykki at vera eitt sag av advokati hjá vóru fráfallsfólki og gera vart við vanbøta, tá t.d. politiskarir umbúgva og við lóg minka um veitingarverðið hjá fólki, og síðan gera umstøðurnar hjá fólki verri. Norvegia cigur Almannastovan at gjalda vegna vóru fráfallsfólk til politiskarir eisa at lækka veitingarverðið hjá arbeiðsleysum. Tað eitt eisini at verði meiri bagagi hjá starvsfólki Almannastovunnar at arbeiði, tí tey fáa ikkjar fólki betri.

Tað er sera undrunarvert, at Almannastovan á 4 maskinskrivaðum síðum ikki megnar at síggja nakað gott í, at ein politiskur flokkur stríðist fyri at fólk, ið eru arbeiðsleys, kunnu fáa betri fíggjarligar umstøður at lívbjarga sær vaðir.

Sum tíðkarvilbi lagtingsmaður kervur undirtitlaði eina frágreiðing frá Almannastjórnum. Tí Almannastovan vil vórutervsla skrivi vanligu partapolitiskt umboð hjá ávirkum starvsfólkum á stovnsins, so eigur inkluttur tekna í hesum sambandi at fáa fyrigur fyri tey. Politiskarir eiga undir engum umstøðum at fáa seg í, at sia stovnur, ið umsitur umf. 30 % av fíggjarligum arbeiðu fyri øðrar politiskar flokkar.

Verkamannafylkingin eitur ikki at koppa eitanini um, at fólk, ið eru arbeiðsleys, skulu hava sama sendir sum onnur, ið av ymsum orðskum eru avskorin ella vinna til óvsan upphávi.

Vegna Verkamannafylkingina

Kristian Magnussen

Kristian Magnussen, tinglimur:

Nógv fyri

Kristian Magnussen vil hava almannastjóran at grundgeva fyri einum skrivi, sum Verkamannafylkingin fekk frá Almannastovuni undir samgongusamráðingunum. Hann leggur almannatjóran undir at ganga ørindi fyri politikararnar

Nú treingist samanum hjá umboðum fyri ávísar flokkar, sum undir valstríðnum gjørdu okkurt evni til sítt persónliga stríðsmmál.

Dómarakanningin er eitt úrslit av givnum lyftum, og nú vil Kristian Magnussen gera vart við vallyftið hjá Verkamannafylkingini, um at bøta um korini hjá arbeiðsleysum, sum var hansara hjartamál í valstríðnum.

Kristian Magnussen leggur í skrivi almannastjóran undir at ganga ørindi fyri politikarar. Hann sigur seg hava biðið almannastjóran svarað nøkrum spurningum í hesum sambandi. Einki svar er komið, og tí hevur Kristian Magnussen gjørt ov at almanna kunngera hetta brævið.

Kristian Magnussen sigur m.a. í brævinum:

Undir samgongusamráðingunum millum teir fýra flokkarar, kom 9. september í fjør eitt skriv frá almannastjóranum, sum Kristian Magnussen heldur, á sera ósakligan hátt var við til at spenna bein fyri Verkamannafylkingini og møguleikunum hjá arbeiðsleysum at fáa hægri forsorgarveitingar.

Verkamannafylkingin stríddist við hinar flokkarnar, fyri at fáa forsorgarlógina broytta soleiðis, at arbeiðsleys skuldu hava eina tørvsútrokning, eftir somu meginreglu sum fólk, ið fáa forsorgarhjálp vegna sjúku, barnsburð, samlívsslit og annað.

Kristian Magnussen sigur at enda í brævinum, at tað er sera undrunarvert, at Almannastovan á fýra maskinskrivaðum síðum ikki megnar at síggja nakað gott í, at ein politiskur flokkur stríðist fyri at arbeiðsleys kunnu fáa betri fíggjarligar umstøður at lívbjara sær.

Dagny

Andreas Petersen, landsstýrismaður:

Vanlig mannagongd

– Tað er ikki óvanligt undir samgongusamráðingum, at stjórar á almennum stovnum svara spurningum frá samráðingarpørtum. Almannastovan svaraði fyrispurningi eins og fleiri aðrir almennir stovnar í umsitingini, sigur Andreas Petersen

- Stjórar á almennum stovnum ganga ikki ørindi fyri politikararnar, tá teir svara fyrispurningum.

- Tað er skylda teirra at veita neyðugu upplýsingarnar, eitt nú undir samgongusamráðingum.

Hetta sigur Andreas Petersen, landsstýrismaður í almannamálum.

- Málið, sum Kristian Magnussen hevur gjørt vart við, snýr seg um, at tað undir samgongusamráðingunum m.a. varð tosað um at broyta forsorgarlógina soleiðis, at ein tørvsveiting skuldi verða grundarlagið fyri veitingum í lógini, sigur Andreas Petersen.

Åbøtur vóru gjørdar

Tá hetta gjørdist ivamál undir samráringunum, var almannastjórin biðin um at svara spurningum í hesum sambandi. Åbøtur vóru júst gjørdar í forsorgarlógini í mai 1994, fyri at bøta um støðuna hjá arbeiðsleysum. Eitt nú varð stuðulin til arbeiðsleysar forsyrgjarar hækkaður til 125 pst. av fólkapensiónsupphædd, umframt eitt ávíst barnaískoyti .

- Landsstýrismaður í almannamálum heitti tí á almannastjóranum um at geva samráðingarpørtunum eina meting av, hvussu henda lógarbroyting hevði

Andreas Petersen, landsstýrismaður í almannamálum

hildnast, eftir at hava verið í gildi í hálvt ár, sigur Andreas Petersen.

Í svarinum til politisku partarnar, sigur almannastjórin, at hann ikki heldur tað vera ráðiligt at broyta lógina enn einaferð, av tí at ov stutt tíð var fráliðin síðani lógin var broytt seinast.

Hann mælir til at bíðað verður við at gera lógarbroytingar, áðrenn greitt yvirlit fæst yvir, hvussu lógarbroytingin virkar.

Andreas Petersen sigur, at stjórar í fyrisitingini hava skyldu at gera slíkar metingar, eins og teir hava skyldu at greiða politikararnum frá úrslitinum.

Aðrir almennir stjórar

- Annað er, at Kristian Magnussen ikki er samdur við almannastjóran um hesar metingar, men tað er ikki tað sama sum at siga, at stjórar í almennu umsitingini ganga øðrindi fyri politikararnar, sigur Andreas Petersen.

Andreas Petersen undrast stórliga, at Kristian Magnussen ikki hevur nakað at seta á aðrar stjórar í umsitingini, sum vanliga verða boðsendir, tá samgongusamráðingar fara fram.

- Undir somu samráðingum sóu vit í Degi og viku umframt almannastjóran, eisini stjóran á Toll- og skattstovuni og stjóran á Hagstovuni.

- Teir, eins og aðrir almennir stjórar verða spurdir um ivamál og skulu meta um, hvørt tað sum verður sett fram undir samgongusamráðingunum er møguligt at føra út í verki ella ikki, sigur Andreas Petersen.

Dagny

Frá Kommunulæknanum á Skála

Eg eri burturstaddur
frá 30. jan.–10. febr. í 95
Neyðug læknahjálp fæst hjá grannalæknunum.

Sigvald Kristiansen

SKEIÐ

Skipað verður fyri skeiðum í

1. Sambandi og samtarvi við limirnar
2. Agitatión

Skeiðini verða í Havn í vikuskiftinum 10.–12. februar og í Klaksvík 17.–18. februar.

Tilmelding og upplýsing hjá limafeløgunum **innan mánadagin 30. januar.**

Føroya Javnaðarflokkur

Til Islendingavina

Seinasti frestur að tilkynna þáttøku í þorrablótinu 11. febr. er 27/1. Hringið í Ernu 16896 eða Njál 19194.

Kostnaður er 200 pr. mann.

TVANGSAUKTION

På Dommerkontoret, C. Pløyensgøta 1, 100 Tórshavn, afholdes
torsdag
den 16. februar 1995, kl. 10.40
tvangsauktion,(AS 502/94) over matr. nr. 47, Depil beliggende Depil.

Auktionen er begæret af advokat Jógvan Ellefsen, Bryggjubakki 22, Tórshavn, tlf. 1.1260 (j. nr. 39670) på vegne en pant og udlægshaver.

Ejendommen er et beboelseshus. Det bebyggede areal udgør 92 kvm. i kælder og stueetage.

Ejendommen kan beses efter aftale med ovennævnte advokat.

Auktionsdokumenterne ligger til gennemsyn på dommerkontoret.

Færøernes fogedret,
den 24.01.95
Henrik Engell Rhod
dfm.

TVANGSAUKTION

På Dommerkontoret, C. Pløyensgøta 1, 100 Tórshavn, afholdes
torsdag
den 16. februar 1995, kl. 13.50
tvangsauktion,(AS 518/94) over matr. nr. 1098 c, Tórshavn beliggende Velbastaðvegur 58.

Auktionen er begæret af advokat Fríða Patursson, Fr. Petersensgøta, Tórshavn, tlf. 1.1145 (j. nr. 940913) på vegne en pant og udlægshaver.

Ejendommen er et beboelseshus på en 606 kvm. stor grund. Det bebyggede areal udgør 110 kvm. i 1 etage, udbygning 19 kvm.

Ejendommen kan beses efter aftale med ovennævnte advokat.

Auktionsdokumenterne ligger til gennemsyn på dommerkontoret.

Færøernes fogedret,
den 25.01.95
Henrik Engell Rhod
dfm.